

# Brislingur undir Føroyum
## - lívfrøði og útbreiðsla

Eydna í Homrum, Havstovan

Vísindavøka á ferð í Hovi,

28. oktober 2020

Vísindavøka

# Innihald

- Stutt um brisling og føroyska brislingafiskiskapin
- Árstíðarlýsing á Skálafjørðinum
- Útbreiðslan av brislingi undir Føroyum
- Vøkstur, kynsbúning og støddarsamanseting
- Taka samanum

- Úrslitini eru frá kanningum seinastu fýra árini
  - Ein undanverkætlan
    - brislingur á Skálafjørðinum
  - Kanningar við rannsóknarskipi
  - Kanningar av brislingi frá royndarfiskiskapinum

# Brislingafiskiskapur undir Føroyum

- Veiðuhagtøl eru tøk aftur til 1997
  - brislingur er tó fiskaður minst 25 ár áðrenn tað
- Fiskiskapurin er skipaður sum royndarfiskiskapur
  - hava verið 3 loyvi í nøkur ár
- Fiskiskapurin er á firðum og sundum frá november til februar
- Seinastu 9 árini eru fiskað millum 150 og 600 tons



# Stutt um brisling

- Brislingur er í ætt við sild
  - sera líkur sild men væl minni
  - brislingur hevur hvast kjalarskrubb
- Livir heilt nær landi undir Føroyum
- Aðrastaðni er høvuðsføðin æti



Bente Olesen Nystrøm



# Árstíðarlýsing á Skálafjørðinum

- B - Ekkóskrift, mett at vera brislingur
- ◯ - Brislingasýni tikið
- ? - Ekkóskrift, men ivasamt hvat tað var
- Brislingaskrift sædd allar ársfjórðingar
- Brislingur staðfestur
  - 1., 2. og 4. ársfjórðing
  - tó smáar nøgdir



# Útbreiðsla av brislingi

- Kannað við rannsóknarskipi
  - Brislingatúrar – ekkó- og trolkanningar
    - november 2018 og november 2019
      - November valdur, tí tá plagar fiskiskapurin at byrja → tá vita vit, at brislingur er millum oyggjarnar
    - mars 2020
      - úrslit frá undanverkætlanini vístu, at brislingur var á Skálafjørðinum alt árið
      - áhugavert var at síggja, hvussu støðan var uttan fyri brislinga vertíðina
  - Yvirlitstroling eftir botnfiski
    - trolkanningar
    - magakanningar
- Frágreiðingar frá royndarfiskiskapi

# Hava vit sæð brisling í øðrum kanningum hjá Havstovuni?

Brislingur fingin í yvirlitstrolingum á Landgrunninum og Føroyabanka 1994-2020




Magar við brislingi - magakanningar á Landgrunninum og Føroyabanka 1997-2020



# Útbreiðsla í november



# Skrásetingar av brislingi í Suðuroy

- t.d. 2011
  - Børn í Vágs skúla glúpaðu nakrar brislingar og fiskaðu við tráðu nakrar makrelar, sum blivu kannaðir
- ... og í mars 2015
  - brislingatorvur sæddar á Vágsfirði – stórseiður fylgdi eftir og át
  - uml 13-15 cm til støddar – tí ivaðust fólk, um hetta mundi vera smásild


www.heimaflotin.com/?p=72

Heimaflotin com

fredag, oktober 23, 2020

ÚTRÓÐRARTÍÐINDIR | TROLTÍÐINDIR | FISKIVINNA | LÍNUTÍÐINDIR | TROLBÁTAR | ÚTLENDSK FISKIVIN

HAVSTOVAN: ÁHUGAVERT, AT MAKRELURIN Á VÁGSFIRÐI VAR FULLUR AV BRISLINGI

oml | april 13, 2015



Tíðliga í heyst fiskaðu børn úr Frítíðarskúlanum í Vági nakrar makrelar, sum vórðu sendir norður á Havstovuna til kanningar. Nú er makrelurin kannaður og frágreiðing send børnunum.

*Hetta skrivar Dennis Holm tann 25. oktober 2011 14:48 á Suðuroyarportalurin. Vit endurgeva greinina her. Eisini er ein onnur grein ið vísir á, at nógvur brislingur eisini var á Vágsfirði februar 2015.*

Kanningarnar hjá Havstovuni staðfesta, at makrelurin hevur etið stórar nøgdir av brislingi. Onkur makrelur, sum børnini í Frítíðarskúlanum í Vági fiskaðu heili tjúgu brislingar í maganum.

# Várkanningar mars 2020 við rannsóknarskipi

- Brislingur var bæði á Tangafirði og Skálafjørðinum
- Gýtandi brislingur varð fingin á Skálafjørðinum



[redacted]

# Brislingalívfrøði
# vøkstur, kynsbúning og støddarsamanseting





# Vøkstur og kynsbúning



# Aldurssamanseting

- Aldursgreiningar eru týðandi fyri at kenna lutfalsligu nøgdirnar av ymsum árgangum
  - til stovnsmetingar
  - til vistskipanarkanningar
- Ábendingar eru um, at 2015 árgangurin var góður
  - fingu nógv sum 2 og 3 ára gamlan – og eisini lutfalsliga nógv sum 4 ára gamlan



# Hvat vita vit eftir 4 ár av kanningum

- Brislingur er inni við land alt árið
  - tó stendur hann helst øðrvísi um summarið, soleiðis at hann ikki er so atkomuligur fyri fiskiskap
- Ekkókanningar eru helst væl egnaður háttur at meta um nøgdina av brislingi við Føroyar
  - um so er, kann hetta seinni nýtast í stovnsmetingum
- Brislingur við Føroyar gerst upp til uml. 7 ára gamal – tó sjáldan eldri enn 4 ár
- Brislingur gýtir inni við land um várið
  - brislingur gýtir tó í ‘verðum’, og gýtingartíðin kann tí vera long
  - brislingur byrjar at gýta, tá hann er uml. 8 cm til støddar og 1 ára gamal

# Hvat vita vit ikki enn

- Enn eru vit ikki tilreiðar at gera stovnsmeting
  - mugu hava aldursgreiningar í nøkur ár afturat – til vit hava tøl fyri nakrar heilar árgangir
  - vit mugu tryggja okkum, at ekkókanningar umfata høvuðsútbreiðsluøkið í nøkur ár til at vísa upp- og niðurgongd í stovnsstøddini
- Enn kenna vit ikki leiklutin hjá brislingi í vistskipanini
  - Hvønn etur brislingur?
  - Hvør etur brisling?

Vísindavøka

HAVSTOVAN
FAROE MARINE RESEARCH INSTITUTE

FISKIVINNU
GRANSKING